## OB er danskur steypavinnari

FCK mátti hósdagin veitra farvæl til donsku greipuna, tá tað ikki eydnaðist teimum at vinna á OB í steypafinaluni
Fyrsta korterið sá annars út til, at hetta var dagurin hjá FCK. Teir høvdu fullkomiliga tamarhald á spælinum frammanfyri teimum 30.000 áskoðarunum í Parkini, og tá ið júst eitt korter var farið, gav hetta úrslit. Silberbauer fann Atiba Hutchinson, sum rak OB-málverjan av og skoraði til 1-0. Eftir hetta kom OB meira inn í dystin, og í 37. minutti eydnaðist tað eisini teimum at javna. Martin Borre skeyt eitt langskot beinleiðis í netið, og so var aftur stórur spenningur í dystinum. Í seinna hálvleiki sá OB út til at vilja tað mesta. Tað vóru eisini bert fimm minuttir farnir av seinna hálvleiki, tá ið teir løgdu seg odda. Jonas Borring legði eitt innlegg í pannuna á Bechara Oliveira, sum trygt kundi skalla OB á odda 2-1. Seinasta korterið legði FCK trýst á OB, men teimum eydnaðist ikki at fáa útjavnandi málið.

## Framtíðin hjá Súna skjótt avgjørd

Sleppur Súni Olsen at halda fram í AaB? Hetta er brennandi spurningurin, nú sáttmálin hjá honum við felagið gongur út í summar. Tað er í øllum førum líkt til, at ein avgerð fellir skjótt, tí seinastu dagarnar hava tríggir leikarar fingið sína framtíð við felagið avkláraða. Fyrradagin mátti miðvallarin Thomas Kortegaard takka fyri seg, og í gjár fekk verjuleikarin Martin Pedersen sín sáttmála longdan við tveimum árum, samstundis sum miðvallarin Fredrik Winsnes skifti til norska felagið, Strømsgodset. Í samrøðu við Sosialin fyrr í ár segði Súni Olsen, at hann føldi seg hava álit frá leiðsluni í felagnum, og at hann hevði góðar vónir um at fáa sáttmálan longdan. Nú má tíðin so bara vísa, hvar Súni spælir komandi kappingarár.

EB/Streymur-ÍF 10-9 eftir brotsspørk:

# Stórt vónbrot hjá fuglfirðingum

**Átta korter og seks brotsspørk skuldu til, áðrenn oddaliðið í Formuladeildini fekk bilbugt við liðið, sum liggur á triðja plássi í 1. deild. Fuglfirðingar kundu verið stoltir av úrslitinum, men eru vónbrotnir um at verða sendir úr steypakappingini**

FÓTBÓLTUR
*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*

Tað sá annars rættiliga vónleyst út hjá fuglfirðingum tá trý korter vóru spæld. Teir vóru aftanfyri 3-1, og høvdu 45 minuttir at skora minst tvey mál í móti liðnum, sum hevur latið níggju mál inn í níggju dystum. Samstundis skuldi ÍF halda tætt í hinum endanum. Ein serstakliga trupul uppgáva, sum tó eydnaðist.

### Ráðaleysir og mótfalnir

EB/Streymur fekk ætlaðu byrjanina, tá Ronnie Samuelsen skoraði eftir fáum minuttum.

Fuglfirðingar javnaðu við frálíkum langskoti frá ógvuliga vælleikandi Elvan Taser. EB/Streymur gjørdi tó skjótt hesa útjavnan til skammar, tá Ronnie Samuelsen skoraði sítt næsta mál, og Hanus Eliasen síðani økti, áðrenn liðini sluppu til hálvleik við støðuni 3-1.

Í seinna hálvleiki tóktist heimaliðið at vera nøgt við støðuna. Teir gjørdu í hvussu so er einki fyri at økja um leiðsluna. Fuglfirðingar vistu hinvegin, at teir máttu stríðast fyri hvørjum einasta bólti, um teir skuldu fáa EB/Streym aftur.

Miðskeiðis í seinna hálvleiki fingu teir løn fyri stríðið, tá Elvan Taser aftur kemur á máltalvuna, eftir klossut verju- og málmansspæl. Nú spentu fuglfirðingar í, meðan sundalagsmenn tóktust ráðaleysir og mótfalnir.

Setningurin varð fullførdur í 80. minutti, tá Bartal Eliasen rann Símun Eliasen av, legði bóltin fyri føturnar á Nenad Saric, sum setti bóltin í netið. Javnleikur, sum helt sær til teir 90 minuttirnir vóru spældir.

Fyrstu seks korterini vóru av. ÍF hevði vunnið seg inn í aftur dystin og fekk nú tvey korter aftrat á vøllinum, sum gjørdust bæði spennandi og dramatisk.



*Fuglfirðingar lótust ikki um vón, at teir spældu móti oddaliðnum í Formula-deildini. Men vónbrotið var stórt, tá teir bert vóru fimm minuttir og síðani eitt brotsspark frá sessinum í hálvfinaluni*

*Mynd: Sofus Debes Johannessen*

### Tvey mál og útvísing

Fyrra umfar hevði lítið at bjóða uppá, meðan tvey mál og ein útvísing fullu í seinna umfarinum. Tað var Hans Pauli Samuelsen, sum varð vístur út, tá hann sprellaði í eini roynd at røkka bóltinum, sum var á veg út av linjuni. Bólturin tók í armin, sum ikki var upp á pláss, og Rúni Gaardbo kendi seg noyddan til at geva víkarmanninum sítt seinna gula kort. Eftirfylgjandi frísparkið varð sent heilt inn undir EB/Streymamálið, har Høgni Zachariassen legði seg aftur av og saksasparkaði bóltin í netið.

Við tíggju monnum móti ellivu og afturúr við einum máli, sá tað av álvara svart út hjá EB/Streymi. Men eydnan var við sundalagsmonnum. Hóast tað ikki var uppiborið, megnaðu teir at javna, tá Ronnie Samuelsen setti bóltin í netið eftir hornaspark. Løtu seinni varð dysturin avblástur, og neyðugt var við brotsspørkskapping fyri at fáa eina avgerð.

Í fyrstu fimm royndunum skoraðu Ronnie Samuelsen, Egil á Bø, Brian Olsen og John Heri Dam fyri EB/Streym, meðan Teitur Joensen brendi triðja brotssparkið. Elvan Taser, Áki Petersen, Høgni Zachariassen og Bartal Eliasen gjørdu tað sama fyri ÍF, meðan Tórður Lervig misnýtti fjórða brotssparki hjá ÍF.

Sætta brotssparkið hjá EB/Streymi setti Marni Djurhuus trygt í netið, og aftaná bjargaði René Tórgarð brotssparkinum frá Fritleif í Lambanum.

### Vónbrotnir men ernir fuglfirðingar

Spurningurin hví dysturin endaði sum hann gjørdi, er einfaldur at svara. EB/Streymur spældi langt undir teirra vanliga støði, meðan ÍF við Elvan Taser á odda kempaðu fyri hvørjum einasta bólti, spældu ein fínan dyst og kunnu vera meiri enn nøgdir við teirra avrik. Munurin millum deildirnar sást snøgt sagt ikki.

Men fuglfirðingar fóru vónbrotnir úr Streymnesi, tó ernir av teirra monnum. Sundalagsfólk kenna seg hinvegin heppin, men spyrja seg sjálvi, hvussu tað bar til, at ein 3-1 leiðsla móti einum liði úr næstbestu deildini varð tveitt fyri borð soleiðis.

**FAKTA**

**EB/Streymur-ÍF 10-9 eftir brotsspørk**
**4-4 (3-3 (3-1)** eftir vanliga og longda leiktíð
**1-0:** Ronnie Samuelsen, 2.
**1-1:** Elvan Taser, 22.
**2-1:** Ronnie Samuelsen, 38.
**3-1:** Hanus Eliasen, 42.
**3-2:** Elvan Taser, 67.
**3-3:** Nenad Saric, 79.
**3-4:** Høgni Zachariassen, 108.
**4-4:** John Heri Dam, 115.
**Reytt kort:** Hans Pauli Samuelsen

# Trivaligur sigur til toftamenn

**Øssur Hansen skal giftast í morgin. Tí varð landskappingardysturin hjá B68 á heimavølli ímóti LÍF framfluttur til Kristi Himmalferðardag**

FÓTBÓLTUR
*Jóannes Hansen*
*joannes@sosialurin.fo*

B68 vann sannførandi 4-1 sigur, og toftamenn stevna beint ímóti bestu deildini. Brúðgommurin syrgdi sjálvur fyri fyrsta málinum við brotssparki.

LÍF var væl við fyrstu løtuna, og ta eina ferðina bjargaði Gunnar á Steig væl, tá ið Jón Eliasen royndi seg.

B68 hevði mesta partin av 1. hálvleiki greiða yvirvág, men teir fingu einki mál afturat í hesum umfarinum.

Leirvíkingar vóru ikki væl nøgdir, og kanska høvdu teir ikki fokus á rætta staðnum. Sigfríður Olsen sá reytt, men kortini eydnaðist tað Adriani Joensen eftir innlegg frá Sølva Vatnhamar at javna.

Eftir steðgin skoraði B68 trý mál. Alexandro Casthilio eftir frísparksinnlegg úr høgru og út frá, Jann Ingi Petersen við beinleiðis hornasparki úr vinstru, og fram ímóti dystarenda aftur Alexandro Casthilio.

Hetta var triðja tapið upp í slag hjá LÍF, sum í løtuni tykist langt frá málinum, ið er Formula deildin.

**FAKTA**

**B68-LÍF 4-1 (1-1)**
**1-0:** Øssur Hansen br. 11.
**1-1:** Adrian Joensen 45.
**2-1:** Alexandro Casthilio 58.
**3-1:** Jann Ingi Petersen 62.
**4-1:** Alexandro Casthilio
**Reytt kort:** Sigfríður Olsen 34.